# m verða ikki tikin



*Atli P. Dam kom í landsstýrið fyrstu ferð, tá Ville Sørensen doyði nýggjársdag í 1970. Atli kom úr Kuwait, har hann arbeiddi sum verkfrøðingur og tók við sum landsstýrismaður í marsmánaði. Eftir løgtingsvalið í november skipaði hann samgongu í desember. Gamla samgongan helt fram, men við Atla Dam sum løgmanni saman við Jákup Lindenskov. Sambandsflokkurin valdi tveir nýggjar landsstýrismenn, Petur F. Christiansen og Eli Nolsøe. Sjálvstýrismaðurin, Sámal Petersen úr Klaksvík helt fram, men legði frá sær í 1972, tá Asbjørn Joensen kom í landsstýrið (sum myndin sýnir)*



*Óbeinleiðis orsøkin til, at Atli Dam kom upp í politikk, var at pápi hansara doyði í løgmansembætinum í 1968. Tá býtti Javnaðarflokkurin løgmansembæti um við tveir landsstýrissessir. Jákup Lindenskov og Ville Sørensen komu í landsstýrið, meðan Kristian Djurhuus úr Sambandsflokkinum gjørdist løgmaður. Tað var tá Ville Sørensen doyði nýggjarsdag í 1970 – í landsstýrisembætinum – at boð vóru send eftir Atla Dam, sum tók við sum landsstýrismaður í samferðslu og fiskivinnumálum fram til valið í november hetta árið*

ið, sum Kristian Djurhuus nú var løgmaður fyri. Hetta var 19. november í 1968, men 1. januar í 1970 andaðist Villi Sørensen, og tá var tað, at boð vórðu send eftir Atla Dam.

Atli var landsstýrismaður í samferðslu- og fiskivinnumálum fram til eftir valið í 1970. Á løgtingsvalinum 8. november 1970 varð Atli uppstillaður á javnaðarlistanum í Suðuroyar valdømi ella á sama lista, sum pápi hansara hevði verið uppstillaður og valdur á øllum valunum 1928-1966. Suðuroyingar góvu Atla Dam dygga álitisváttan beinanvegin. Á valinum í 1970 fekk hann 542 persónligar atkvøður, og hann varð valdur aftur á øllum valunum fram til og við í 1988.

## Skifti makkarar

Eftir valið í 1970 helt Atli Dam, sum skjótt gjørdist formaður í Javnaðarflokkinum, fram í sonevndu heimastýrissamgonguni, sum Petur Mohr Dam hevði verið oddamaður fyri 1958-1962 og 1966-1968, og sum Atli Dam í 1970 hevði verið landsstýrismaður í.

Men eftir valið í 1974 skifti Atli Dam samgongufelagar. Hóast hann var ríkisfelagsmaður um ein háls, so vildi hann royna møguleikan at yvirtaka umsitingina av felagsmálum, soleiðis sum tað var latið upp fyri í grein níggju í heimastýrislógini. Samgongusamráðingarnar vóru drúgvar, men 11. januar í 1975 varð samgonga skipað millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin. Høvuðsarkitektarnir aftan fyri samstarvsavtaluna vóru Atli Dam, Jógvan Sundstein og Finnbogi Ísakson.

Talan var um breiðastu samgonguna, sum inntil tá hevði verið undir heimastýrisskipanini. Samstarvið slitnaði mitt í næsta valskeiðnum. Í tey seks árini vóru útbyggingarnar og broytingarnar av almenna sektorinum og høvuðsvinnuni ógvuliga stórar.

Postverkið varð yvirtikið, og fyrisitingin av heilsuverkinum, almennaverkinum og skúlaverkinum vórðu yvirtiknar. Ráfiskagrunnurin, sum upprunaliga var ætlaður sum stuðulsskipan til útróðurin, sum í 1975 var í kreppu orsaka av oljukreppuni, sá dagsins ljós, og sambært samtykt á havrættarstevnu hjá ST varð føroyska fiskimarkið 1. januar í 1977 flutt út á 200 fjórðingar.

Í januar 1974 samtykti Løgtingið, at Føroyar ikki skuldu taka av tilboðnum um at gerast limur í EEC, sum tað tá kallaðist. Eftir tað vóru nógv samráðingarumfør um fiskiveiðusáttmála og handilssam-

*Framhald á næstu síðu*